

*Litirnir á gongini eru valdir út frá stóra málninginum*



*Sjúklingarnir rósa himinum fyri at duga væl at fáa burturúr. Einki fer burtur, og Thora Kúrberg bakar øll breyðini*



*Tvær stórar og ljósar uppihaldstovur eru á hvíldarheiminum*



*Vakurt er uttan um heimið í Gundadali*

Naina ikki hevði ráð henda dagin at keypa fisk fyri eina krónu.

Blaðmaðurin var forfardur og setti seg beinanvegin í samband við danska blindastovnin, sum sendi heiminum 5000 krónur. Afturfyri skuldu sjónveik kunna koma á hvíldarheimið, og tann regla er framvegis galdandi.

Peningurin fór til ein grunn, so ognarleysar konur kundu koma á heimið.

## Nógv vælvild

Ása Olsen sigur, at Naina gjøgnum árini hevur fingið nógvar gávur, og fleiri fólk hava testamenterað ognir sínar til hvíldarheimið. Hetta er eisini hent í nýggjari tíð.

Alma og Ehrenfryd Juhlet lótu alt sítt til heimið. Nakað av vakra innbúgvinum á Naina var brúðargáva teirra og tey góvu eisini heiminum málningar.

Tá ið hann fekk starv í Danmark sum postmeistari, fóru tey av landinum aftur.

Men tey gloymdu ikki Naina so. Í 1963 var Naina í so svárari trongstøðu, at stýrið valdi at lata heimið aftur.

Hetta harmaði tey bæði, so tey komu aftur til Føroya, og Kvinnufelagið í Havn gekk saman við teimum á odda fyri at fáa heimið at lata upp-aftur. Hetta eydnaðist í 1965.

Um hetta mundið var Anna Danielsen leiðari, so kom Ansa Djurhuus, Katrin Dahl, og fyri átta árum tók Ása Olsen við sum fyristøðukvinna.

Naina er nakrar ferðir bygt út. Alt er líka væl gjørt og væl hildið, so tey kenna einki til blámusopp.

## Alt gott

Fíggjarliga er heimið eisini væl fyri. Starvsfólkini eru sjey sjúkrarøktarfrøðingar, økonoma og reingerðarfólk. Húsavørð hava tey ongan, tí starvsfólkini duga sjálv at siggja, um okkurt krevur ábøtur, og so verður ringt eftir handverkarum.

– Vit hava ótrúliga góð starvsfólk, sum ganga so høgt uppí at hugna um og halda húsið, at tað kundi næstan verið teirra egna. Eingin er bangin fyri at taka eitt eyka tak. Vit eru fegin um at halda føðingardag og samstundis minnast tey menniskjuliga virðini í teimum fólkunum, sum tóku stig til heimið, sigur Ása Olsen.

- Hetta húsið er so vælsignað, at eg gleði meg hvønn dag at fara til arbeiðis, sigur hon.

**» – Vit hava ótrúliga góð starvsfólk, sum ganga so høgt uppí at hugna um og halda húsið, at tað kundi næstan verið teirra egna**

## Fáa heilsubót

Upprunaliga var hvíldarheimið fyrst og fremst ætlað teimum forstríddu og veiku konunum. Framvegis eru tað mest kvinnur á hvíldarheiminum, men av og á eru menn eisini har. Hetta tulkar Ása Olsen sum, at tá ið ein maður er sjúkur ella er útskrivaður av sjúkrahúsi, tekur konan sær av honum. Sjáldan er tað øvugt, at maðurin á sama hátt tekur sær av konuni. Haraftrat duga kvinnur illa at binda frið heima.

Sjúklingarnir á Naina fáa alt borið upp í hendurnar, tí tey skulu binda frið. Men tey kunnu altíð spáka sær ein túr. Tað gevur eisini heildubót.

Tá ið fólk verða skurðviðgjørd á sjúkrahúsi, verða tey nú beinanvegin skrivað út. Ofta eru tey tá veik og verða ávíst til hvíldarheimið.

- Tað er púra beint, tí tey koma nógv fyrr fyri seg her enn á sjúkrahúsi, har vandin fyri infeksjónum er nógv størri, tí har eru sjúk fólk. Her er friðarligt og ljóst, og sjúklingarnir fáa fulla røkt sigur Ása Olsen.

Ein song á sjúkrahúsi kostar meira enn á hvíldarheiminum.

Tað hendir meira enn so, at kvinnur, sum hava røktarkrevjandi mann heima, koma á hvíldarheimið, tá ið maðurin fer í umlætting, tí tá tørvar kvinnunum hvíld.

Tað koma ikki so nógvar barnakonur longur á Naina, nú samferðslukervið er so gott.

25 pláss eru á Naina, og um 360 fólk eru har um árið.

## List ger væl

Nógvir vakrir málningar eru á hvíldarheiminum. Nakrar hevur Mikines málað og eru frá tíðini, tá ið hann var á hvíldarheiminum. Onnur kend listafólk hava málað aðrar. Onkuntíð hava sjúklingar savna saman pening til málning at geva Naina.

– Tað er gott við so nógvari list her. Øll fara ikki til listaframsýningar. Her eru málningar, sum gleða sjúklingarnar og gera teimum væl, sigur Ása Olsen.

Tað, sum hon veit um, hava allir sjúklingar vrið væl nøgdir, og hon hoyrir mangan aftur frá fólki, sum minast aftur á nakrar góðar vikur á Naina.

Hvíldarheimið Naina verður fíggjað av landinum, Helsutrygd og kommunum, sum rinda størsta partin.